# Føroyar eiga at bindast saman

**Rani Nolsøe, býráðslimur í Klaksvík og fyrrverandi pendlari millum Klaksvík og høvuðsstaðin, sær tað sum eina treyt fyri framhaldandi menningini av Føroyum, at fast undirsjóvar samband verður millum øll tey størru vinnuøkini í landinum**

ØKISMENNING

*Rúnar Reistrup*

Tá Rani Nolsøe fór í starv hjá Kalli setti hann sær fyri at prógva, at tað at hava bústað í Klaksvík ikki var nøkur forðing fyri at hava eitt krevjandi starv í Havn. Men eftir gott hálvt ár sum pendlari millum báðar teir størstu býirnar í landinum má hann nú ásanna, at hann hevur prógvað tað beint øvugta fyri sítt viðkomandi. Og var hann heitur fyri einum undirsjóvartunnli undir Leirvíksfjørð fyrr, so er hann ídag sannførdur um at undirsjóvartunnilin er alneyðugur.

- Tað sum eg eri komin fram til eftir 7 mánaðar í starvinum hjá Kalli er, at eg fái ikki eitt starv í Tórshavn, bústað í Klaksvík og býráðsarbeiði í Klaksvík at hanga saman. Orsøkin er at flutningurin millum Klaksvík og Havnina tekur ov langa tíð, og serliga er tað sera vánaliga sambandið um Klaksvíkina og Leirvík sum ger seg galdandi. Skulu vit gera okkum vónir at menna Klaksvíkina, mugu vit tíanverri staðfesta, at farleiðin í núverandi líki er ein beinleiðis hóttan, sigur Rani Nolsøe. Eins og øll onnur, ið javnan sigla um Leirvíksfjørð hevur hann ferð eftir ferð upplivað at sita veðurfastur øðrumegin Leirvíksfjørð, ella at standa nakkalangur á keiini í Leirvík meðan Dúgvan fer siglandi fullfermd til Klaksvíkar.

– Tá privatfólk javnan hava slíkar trupulleikar, so kan ein bert ímynda sær, hvussu vinnan er fyri, sigur Rani Nolsøe.

## Alt størri tørvur

Tørvurin á flutningini til og úr Norðoyggjum er vaksin stórliga síðstu árini. Fólk ferðast meira, og vinnulívið í Norðoyggjum framleiðir nógv meira nú enn fyrr. Hetta sæst aftur á farmanøgdini, sum verður flutt úr Klaksvík. Rani Nolsøe væntar ikki, at klaksvíkingar kunnu vænta sær at farmaskip fara at sigla á Klaksvíkina í framtíðini, og at mesta vøran tí má flytast um Leirvíksfjørð.

- Vit eru eitt oyggjasamfelag, og vit hava eina stóra fiskaframleiðslu. Saman setir hetta serlig krøv til infrabygnaðin í Føroyum. Um vit vilja breiða búsetingina í landinum og soleiðis troyta tað tilfeingið, sum er, so má landið bindast saman við vegasambandi.

## Isolatiónin dovnar

At kalla einasta samband millum Norðoyggjar og Havnina er við ferjuni um Leirvíksfjørð, og tað hevur sambært býráðsliminum við sær, at Klaksvíkin er væl á veg til at blíva afturúrsigld í mun til onnur øki í landinum.

- Eg meti at Klaksvíkin á fleiri økjum er eini fimm til tíggju ár aftanfyri í mun til vakstrarstøðið í mistaðarøkinum. Og hetta kemst av vánaliga ferðasambandinum til restina av landinum. Um hugt verður at hvat er hent síðan kreppuna, so er Havnin komin sera væl við, og Eysturoyggin liggur ikki langt aftanfyri. Økini hava ment seg nógv og hava fjølbroytta vinnu, tí vanlig kapping hevur lagt eitt dynamiskt trýst á vinnurnar. Í Norðoyggjum, hinvegin, hevur isolatiónin gjørt at vinnan í ein ávísan mun livir í einum vardum lumma. Tildømis eiga virkir innan tænastuvinnuna, ið liggja í Klaksvík, so at siga marknaðin í Norðuroyggjum, tí økið er so isolerað at tað loysir seg oftast ikki at keypa tænastur aðrastaðni frá. Hetta hevur í longdini eina dovnandi ávirkan á vinnulívið her norðuri, og tað sæst aftur á t.d. tænastustøðinum, sum eftir míni meting tíanverri ikki er á hædd við støðið í miðstaðarøkinum. Rani Nolsøe viðgongur, at tað helst finnast nógv, ið gjarna vilja varveita hesa støðu og ikki ynskja broytingar.

- Men eg trúgvi, at vit gera okkum sjálvum eina bjarnatænastu í longdini her norðuri, um vit lata standa til.

- Vit síggja jú at Klaksvíkin á øðrum økjum blómar. Tak t.d. ítróttin og mentanina. Tað er tekin um at býurin er sterkur og livandi, men um vit ikki fáa og fyrireika okkum til fast samband, so verða vit ikki eitt av framtíðar vakstrarøkjunum í Føroyum.

## Minni oyggjasamfelag

Rani Nolsøe viðurkennir at fyri ein suðring, sum sær Smyril leggja frá kei einaferð um dagin, má tað ljóða sum ein luksustrupulleiki tá klaksvíkingar gremja seg um sambandið um Leirvíksfjørð, har tíggju túrar verða sigldir um dagin.

- Tað, sum Suðuroyggin og suðuroyingar uppliva í løtuni er at oyggin veruliga haltar aftur úr í menningini orsakað av vánaliga sambandinum við restina av landinum. Tað sær ikki gott út, og eg haldi ikki at man skal lata standa til. Loysnin er, í eygunum á býráðsliminum í Klaksvík, at útbyggja infrabygnaðin millum oyggjarnar so nógv, at tað mesta av Føroyum við tíðini gerst til eitt samanbundið øki.

- Fast samband millum oyggjarnar er ein fortreyt fyri at vit kunnu útnytta tilfeingið í Føroyum. Vit koma at renna okkum í alsamt ávarsamari fløskuhálsar, um vi ikki syrgja fyri at fáa fast samband millum tær vinnuliga týdningarmestu oyggjarnar. Málið má vera at knýta so nógv sum møguligt av Føroyum saman við føstum sambandi, og tí er tað eftir mínum tykki ein fortreyt fyri menningini av føroyska samfelagnum, at fyrireikingarnar til undirsjóvartunnil til Klaksvíkar halda fram sum ætlað. Hareftir eiga vit sjálvandi eisini at kanna landafrøðiligu og búskaparligu fortreytirnar fyri øðrum tunnlum, t.d. til Sands og Suðuroyar, heldur Rani Nolsøe, býráðslimur í Klaksvík, sum nú eftir ætlan fer aftur í starvið sum Havnar- og Menningarstjóri í Klaksvík, sum hann røkti áðrenn hann fór í starv hjá Kalli..










# SMS heldur ólavsøku



Tíðindaskriv

Síðsta leygardag kl. 14.00 setti Heðin Mortensen stóru Ólavsøkuframsýningina á Torginum í SMS. Í ár verða modell av føroyskum sluppum og myndir av manningum sýndar fram á Torginum í døgunum 21. juli til 4. august. Aftur í ár er tað Birgar Johannesen, sum stendur fyri stóru framsýningini, sum síðan 1995 hevur verið í SMS. Birgar sigur, at framsýningin hesaferð ikki er minni spennandi enn tær undanfarnu.

- Eg havi brúkt stóran part av frítíð míni í ár at fyrireika hetta tiltak. Eg havi savnað yvir 200 myndir av manningum og einstaklingum, og eini 10-15 modell av sluppum. Og so havi eg eisini fingið fatur á mynstringarlistum, ið somuleiðis verða á Torginum hesar dagarnar, sigur Birgar.

Umframt myndir, modell og mynstringarlistar verða lutir frá hesi tíðini sýndir fram.

Hósdagin, 26. juli og fríggjadagin, 27. juli, hevur B36 eisini stórt tombola á Torginum.

## Ólavsøkukabarrettin vitjar Torgið í SMS

Eitt av mongu afturvendandi tiltøkunum á Ólavsøku er kabarettin, sum verður framførd í Sjónleikarhúsinum. Seinnu árini hevur Ólavsøkukabarettin verið ógvuliga væl móttikin, og ummælini hava eisini verið góð. Í ár siga fyrireikararnir, at hon stendur einki aftanfyri tær undanfarnu.

Og tey, sum vitja SMS, kunnu fáa forsmakk av kabarettini. Tí longu mánadagin, 23. juli kl. 15.00, vóru tey úr Ólavsøkukabarettini á Torginum í SMS og framførdu brot úr kabarettini. Mikudagin kl. 16.00 vera fólk frá kabarettini aftur á Torginum. Annars verður væntað, at leikararnir ímillum sýningarnar í Sjónleikarhúsinum fara at støkka inn á gólvið í SMS, og kanska spæla okkurt hissini brot…

## Víkingar og sigoynarar í SMS á Ólavsøku

Í sambandi við, at stórur víkingamarknaður verður á Glaðsheyggi á Ólavsøku, vitja víkingar og sigoynarar SMS í ólavsøkuvikuni. Tað er føroyska samtakið Siðsam, ið hevur til endamáls at skipa fyri siðsøguligum tiltøkum, sum skipar fyri tiltakinum, saman við fólkum úr Fjørukrónni á Hafnafirði.

Umleið 50 gestir úr 12 londum eru boðnir at luttaka á forkunnugu víkingatiltakinum á Glaðsheyggi, og nakrar koma eisini at vitja Torgið í SMS.

Fyrst í vikuni vitjar sigoynarabólkurin, Tulcinella, SMS. Hesi verða rópt gyklarar. Teir framføra ymiskt skemtiligt í margháttligum búnum.

Seinni í vikuni verður tónleikabólkurin, Valravnen, á Torginum í SMS. Manningin er klødd í víkingaklæði, og syngur stuttligar sangir.


